Almanna- og mentamálaráðið

/her

9. juni 2023

Hoyringarsvar, uppskot til løgtingslóg um Brekumboð

Føroya Lærarafelag og Føroya Pedagogfelag hava hesar viðmerkingar til uppskotið til løgtingslóg um Brekumboð:

Til grein 3, stk. 1:

Í uppskotinum er ásett, hvat brekumboðið skal gera. Í hesum sambandi fara vit at mæla til, at henda áseting verður víðkað soleiðis, at heimsmálini hjá ST, sum viðvíkja trivna, heilsu og útbúgving verða skrivaði beinleiðis inn í lógina. Hetta kann gerast við einum nýggjum broti millum litra 1) og litra 2) sum nýtt brot:

> "2) hava eftirlit við, at tey sum bera brek verða tryggjað eitt heilsugott, stimbrandi umhvørvi og eitt javnbjóðis skúla- og útbúgvingartilboð."

Til grein 8, stk. 1:

Sambært uppskotinum skulu tveir limir veljast í nevndina fyri Brekumboðið, sum umboða almanna-, heilsu-, skúla-, dagstovna- og eldraøkið og frítíðarvirksemið.

Lærarafelagið og Pedagogfelagið halda, at eitt umboð í nevndini átti at verið markað til skúla- og dagstovnaøkið, tí at dagstovnar og skúlar eru teir fyrstu stovnarnir, sum síggja ymiskar avmarkingar og veikleikar í tilboðunum til tey, sum bera brek.

Aðrar viðmerkingar:

Tí er tað týdningarmikið, at nevndin, sum skal ráðgeva brekumboðnum, hevur innlit í viðurskifti sum barnamenning, undirvísing og útbúgving, og eitt umboð í nevndini átti at verið markað til hetta økið. Tey, sum bera brek, hava rætt til eitt stimbrandi umhvørvi og eitt javnbjóðis skúla- og útbúgvingartilboð. Hóast hetta, so hevur umboðsmaðurin víst á, at børn, ið bera brek, ikki hava fingið tær umstøður, frálæru ella skúlagongd, ið tey høvdu rætt til. Hetta kemur m.a. fram í málum og eftirlitsvitjanum hjá umboðsmanninum, t.d. í "Kanning av skúlagongd hjá umsorganaryvirtiknum barni" (LUM 21/01550), "Frálæra í teknmáli" (LUM 16/00029) og "Umboðsmaðurin hevur verið á eftirlitsvitjanum á fimm stovnum fyri børn og ung við menningartarni ella fjølbreki" (LUM 14/00094).

Vinaliga

Føroya Lærarafelag

Jacob Eli S. Olsen
formaður

Føroya Pedagogfelag

Jógvan Philbrow
formaður